# Hundalortur kostaði 42.000 krónur

**Í 1993 var íslendska kvinnan Bryndis Gudmundsdóttir á vitjan í Roykstovuni í Kirkjubø. Í gongini gleið hon í einum hundalorti og kravdi endurgjald fyri skaðan, hon fekk av fallinum. Føroya Rættur hevur nú dømt hjúnini Sølvá og Páll Patursson at gjalda henni 42.000 krónur. Dómurin er tó kærdur til Landsrættin**



*Ein kostnaðarmikil hundalortur. Bryndis Gudmundsdóttir fekk 42.000 krónur í endurgjaldi fyri skaðan hon fekk, tá hon gleið í einum hundalorti*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

ENDURGJALD
*Stefan í Skorini*

Herfyri gjørdi Føroya Rættur niðurstøðu í einum ógvuliga margháttligum máli, sum vit bara kenna úr amerikansku rættarskipanini.

Ein bólkur av ferðafólki er eitt kvøldi í 1993 á vitjan í Roykstovuni í Kirkjubø. Roykstovan er partur av heiminum hjá bóndanum Pálli Patursson og konu hansara Sølvá. Har ferðast javnan ferðafólk at hyggja eftir hesin partinum av húsunum, sum er fleiri hundrað ára gamal.

Hetta kvøldið vil so illa til, at ein hundur hevur lagt ein lort í gongina. Íslendska kvinnan er so óheppin, at hon glíður í lortinum og fær eftir øllum at døma skaða av fallinum, tí tað hevur nú givið henni 42.000 krónur.

Bryndis kravdi upprunaliga einar 80.000 krónur í endurgjaldi, men rætturin skar hetta kravið niður í eina helvt.

### 8% invalid

Danski sakførarin hjá Bryndis, sum eitur Søren Isaksen, førdi í rættinum fram, at kvinnan hevði mist 8% av sínum arbeiðsføri orsakað av fallinum. Hetta gjørdu tey upp í krónum og oyrum, sum gav einar 80.000 krónur.

Bryndis Gudmundsdóttir hevur fingið skaða í knæið orsakað fallinum í lortinum í Kirkjubø. Arbejdsskadestyrelsen í Danmark og aðrir serfrøðingar hava verið inni í myndini gjørt upp, hvussu stórur skaðin er.

Søren Isaksen heldur, at orsøkin, til at hon ikki fekk tær 80.000 krónurnar, sum tey kravdu, kanska er, at Bryndis sjálv ikki var hjástødd í rættinum til dómsviðgerðina. Dómarin kundi tískil ikki nýta hennara vitnisburð sum grundarlag undir dóminum.

Tað kann tískil vera ein fyrimunur hjá teimum at fara í landsrættin. Hann hevur varhugan av, at tað antin verður alt ella einki, tá landsrætturin fer at viðgera málið, sum væntandi verður avgjørt einaferð til várs.

### Alment stað

Rætturin førir fram, at roykstovan og gongin er eitt alment museum og ikki eitt privat heim. Tí hevur eigarin ábyrgd av at halda tað reint, so eingin vandi er hjá fremmandum og ferðafólki at ferðast har.

– Eg haldi, at hesin dómurin er burturvið. Eg havi næstan alt mítt lív roynt at hildið roykstovuna og hesi fornminnini viðlíka, og nú skal eg dømast fyri vantandi reinføri, sigur Sølvá Patursson, sum sjálvsagt er skelkað at úrskurðinum hjá dómaranum, Børge B. Petersen.

Hjúnini høvdu tá fyri átta árum síðani eina hundatrygging, um hundarnir á garðinum komu at gera onkran skaða. Henda tryggingin tók tó ikki við skaðanum í hesum førinum.

Síðani hava tey fingið sær allar hugsandi tryggingar fyri ikki at uppliva hetta einaferð afturat.

Sølvá minnist, at hon stóð í køkinum og bakaði pannukøkur, tá óhappið fór fram. Hon greiðir frá, at hon gav Bryndis pannukøku, og portørarnir, sum komu eftir henni, fingu eisini ein bita hetta lagnutunga kvøldið. Tá droymdi eingin um, at hetta fór at enda við einum endurgjaldskravi á 80.000 krónur.

– Tað er hart at hava hetta sitandi á sær, og 42.000 krónur er eisini nógvur peningur, tí so nógv kastar ferðavinnan ikki av sær, sigur Sølvá, sum kallar hetta fyri »amerikanskar tilstandir í Føroyum«.

Spurningurin er, at um eigarin av húsinum hevur ábyrgdina av, at ein hundalortur er komin at liggja í gongini uttanfyri vanliga upplatingartíð. Tað helt Føroya Rættur í fyrstu atløgu, og nú skal Eystari Landsrættur taka støðu í sama máli.




*Føroya Rættur hevur talað. Ein kvinna, sum gleið í einum hundalorti, fær 42.000 í endurgjaldi. Málið skal eisini fyri í Eystara Landsrætti*

## Sjúkrahúsleiðarin sagt upp



*Hesin sjúkrahúsleiðarin var heldur ikki drúgvur í starvinum. Eftir eitt ár í starvinum hevur Jóanis Erik Køtlum sagt seg úr starvi*

UPPSØGN
*Stefan í Skorini*

Jóanis Erik Køtlum, sum í eitt gott ár hevur verið leiðari á sjúkrahúsinum, hevur sagt seg úr starvi. Hann tók við eftir Jákup Mørkøre, sum varð sagdur úr starvi í januar 2000 av táverandi landsstýrismanninum, Helenu Dam á Neystabø.

Jóanis Erik Køtlum, ið er 35 ára gamal, vil ikki siga nakað um, hví hann tekur seg aftur úr starvinum, men at orsøkirnar eru persónligar. Uppsagnartíðin er tríggjar mánaðir, og starvstíð hansara kemur at enda 1. januar í ár.

Hann sigur við Sosialin, at tað er einki annað starv, sum bíðar honum, nú hann gevst á sjúkrahúsinum.

Starvið skal nú lýsast leyst, og tað ganga óivað nakrir mánaðir, til nýggjur leiðari av landssjúkrahúsinum er funnin.



# Amerikanska fólkið í tvíningum

**– Sjálvandi skulu vit syrgja tey, sum doyðu. Sjálvandi skulu vit harmast um alt, sum varð oyðilagt. Og sjálvandi skulu vit taka øll fyrilit, soleiðis at hetta ikki hendir aftur. Men eftir mínum tykki hevði tað skilabesta verið ikki at hevnt yvirgangsatsóknina hernaðarliga. Tað hevði verið tann mest sigandi boðskapurin, vit kundu sent umheiminum, sigur amerikanarin og Føroya-vinurin, Joel Cole**



*– Yvirgangsatsóknin 11. september hevur avgjørt endavent tjóðskaparligu tilvitskuni í Amerika. Fyrsta eg hugsaði, tá ið eg hoyrdi um atsóknina, var, at einasta stað, slíkt ikki hendir, er í Føroyum, sigur Joel Cole*

YVIRGANGS-ATSÓKNIN
*Turið Kjølbro*

Rættvísi skal sigra, ikki hevndin, sigur Amnesty International í yvirlýsing eftir ræðuligu yvirgangsatsóknina ímóti USA fyri tveimum vikum síðani. Hetta kundi verið orðini hjá amerikanaranum og Føroya-vininum, Joel Cole, sum býr í Shakopee, Minnesota.

Amerikanska fólkið er í tvíningum nú. Meðan stórur partur av fólkinum slær manngarð um Bush forseta í tráan hansara eftir at hevna, setur kanska líka stórur partur av fólkinum spurnartekin við endamálið í hevndini sum eftir øllum at døma er áveg.

– Heilt nógv brúka hesa ræðuligu hendingina sum eitt høvi at gerast tjóðskaparlig um ein háls. Tey syngja og rópa rakstrarróp í gøtunum. Tað er gott, at fólk kenna samkenslu, men mátin nógv fólk vísa hana, er fanatisk eftir mínum tykki. Hesi geva samstundis Bush stjórnini grønt ljós at fremja eina hevndaratsókn, vit ikki kunnu ímynda okkum avleiðingarnar av. Og tað er ræðandi at vera vitni til, at øll tjóðin fyrigevur fólki, sum fremja harðskap eftir atsóknina soleiðis uttan víðari.

– So eru tað hini, tey friðarligu og hugsunarsomu, sum eygleiða hvat hendir, men sum als ikki taka undir við tí, sum kanska fer at henda. Tey seta spurnartekin við, um tað er rætt at hevna atsóknina hernaðarliga og um vit veruliga loysa hesa ógvuliga fløktu støðuna við harðskapi. Sjálvsagt skal eitthvørt gerast. Spurningurin er bara hvar, móti hvørjum, í hvussu stóran mun og hvussu leingi. Støðan er ikki so einføld, sum nógv halda hana vera, sigur Joel Cole.

### Óbúgvin tjóð

Alheims fjølmiðlar og ikki minst fjølmiðlar í USA brúka framvegis nógva tíð og orku at lýsa yvirgangsatsóknina sum var og hvat síðani fer at henda.

–- Vit vóru skelkað og ræðslusligin í fyrsta umfari. Síðani ill og kedd. Eg veit, at nógv eru bangin. Nógv óttast fyri, at yvirgangsatsóknin 11. september bert er tann fyrsta av nógvum. Og í óttanum hugsa tey, at hevnd er ivaleyst einasti vegurin fram. Stjórnin hjá Bush leggur eitt trýst á vanliga fólkið við sínum útsøgnum um hevnd og kríggj, sigur Joel Cole.

Amerikanarar eru vingliskøltar, heldur Joel Cole.

– Vit eru rættiliga óstøðug og skifta meining skjótt og lætt. Samstundis eru vit materialistisk, erpin og krevjandi, og hetta eru alt eginleikar, sum ikki eru góðir. Uttan mun til tað, eru vit vælmeinandi innast inni. Men orsakað av tí fløkta og lemjandi margfeldninum, tú finnur í amerikanska fólkinum, savna vit okkum saman um hesa ræðuligu hending og láta sum um alt er so einfalt. At hetta er stríðið millum tey góðu og óndu. Sum restin av heiminum veit, er hetta als ikki so einfalt.

Joel Cole er sannførdur um, at hevna amerikanarar atsóknina hernaðarliga, er stórur vandi fyri, at aftursvarið verður líka stórt, sum yvirgangsatsóknin í New York og Pentagon.

– Harðskapur fremur harðskap, vita øll, og tað er har vit eru so óbúgvin. Í altjóða høpi eru vit tannáringar. Amerikanarar halda, at vit kunnu fara alla staðni, har vit ætla okkum, og hevna yvirgangskropparnar. Men tað er akkurát tað, sum teir, sum hava framt yvirgangin, ætla. Tí teir vita, at føra amerikanarar kríggj móti teirra heimlandi, verða teir teir lítlu móti teim stóru. Og eg ivist ikki í, at tað eru nógv lond, sum eru fegin um, at hetta stóra landið hevur fingið ein frammaná. Amerik-anarar hugsa als ikki um, at vit verða førd inn í nakað, vit ikki hava tamarhaldið á.

– Ístaðin fyri at halda okkum vera eina stóra og rættvísa eind, eiga vit at seta okkum afturá og læra av søguni, at harðskapur hevur ongatíð ført til nakað gott. Sjálvandi skulu vit syrgja tey, sum doyðu. Sjálvandi skulu vit syrgja øll tey, sum ongantíð komu afturíaftur. Sjálvandi skulu vit harmast um alt, sum varð oyðilagt. Sjálvandi skulu vit taka øll fyrilit, soleiðis at hetta ikki hendir aftur. Men hugsið tykkum, hvussu stórt tað hevði ljóðað um vit søgdu teimum, sum hava ábyrgina av tí sum er hent, at vit taka synd í teimum, at vit fyrigeva teimum og at vit takka teimum fyri, at tey hava gjørt okkum sterkari. Tað hevði verið tann mest sigandi boðskapurin, vit kundu send umheiminum. Ikki minst, tí tað hevði tikið luftina úr øllum hatrinum, sum liggur aftanfyri yvirganginum móti USA.

### Eingin logikkur

USA er høvuðsfíggindin hjá nógvum londum og fólkabólkum kring knøttin. Sum búgvandi í Vesturheiminum kann tað undra ikki sørt, at so nógv stara seg blind í hatri á hetta stóra heimsveldið, sum umboðar so nógv.

– USA umboðar alt tað, sum kann broytast, og alt sum er nýtt. Her er jú eitt margfeldni av møguleikum. Samstundis er USA ein hóttandi tjóð, tí vit hava størsta herin og mest fjølbroytta búskapin í heiminum, sum hevur ávirkan á rikna politikkin í nógvum minni londum. Fólk, sum hata amerikanarar og USA, eru grundleggjandi fanatisk og ræðast allar broytingar. Her er eingin logikkur, bara kenslur, sigur Joel Cole.

### Tænir forsetanum

Undir lógvabrestum tosaði George W. Bush, forseti, til Senatið, Kongressina og amerikanska fólkið hóskvøldið í farnu viku. Hann slóg enn eina ferð fast, at amerikanarar og umheimurin ikki skulu ivast í, at hevndin kemur og at hon verður vend ímóti høvuðsmistonkta Usama Bin Laden.

– Vanligi amerikanarin hevur einki val, men má trúgva tí, sum fjølmiðlarnir siga um sambandið millum atsóknina og Usama Bin Laden. Um stjórnin er aftanfyri herferðina í fjølmiðlunum, er ein annar spurningur. Meginparturin av amerikanska fólkinum trýr av fullum hjarta, at tað er Bin Laden. Eisini í mínum hugaheimi er tað mest sannlíkt, at Usama Bin Laden stendur aftanfyri, sigur Joel Cole.

Joel Cole er ikki í iva um, at fjølmiðlaherferðin, sum hevur verið síðani yvirgangsatsóknina, tænir umdøminum hjá George W. Bush, og at hesin brúkar atsóknina fyri at slóða fyri eini betri politiskari framtíð fyri sær sjálvum.

– Powell, sum er uttanríkisráðharri, sýnist mær at vera ein góður maður, sum betur skilir avleiðingarnar at tí sum kann henda. Lurtar George W. Bush eftir honum, rokni eg ikki við, at vit koma út í eitt kríggj. Men hinvegin heldur Bush fram at polarisera allan heimin fyri ella ímóti USA, veit eg ikki, hvat kann henda. Bill Clinton er ein framúr diplomatur og hevði verið ein nógv betri forseti í eini kreppu sum hesari.

Ásannast má, at røddirnar, sum tosa ímóti hernaðarligari hevnd eftir yvirgangsatsóknina, eru kámar og spjaddar.

– Er vandi fyri einum triðja heimsbardaga, eru vit avgjørt ov friðarlig. Vit, sum eru ímóti eini hernaðarligari hevnd, eru ikki politiskt virkin, og tað ger tað ógvuliga trupult at tosa ímóti, tí sum fjøldin hugsar, sigur Joel Cole at enda í viðtali.